# TILTØK

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20.00 í Fjallbrúður í Vági. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Sumba**
Sunnukvøldið kl. 20.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin ongin sunnudagsskúli vegna familju- og barnagudstænastu, kl. 18.00 Møti við Elidu og Karl Kenning.

**Føroyskt møti í Esbjerg**
Møti verður leygardagin 30. nov. kl. 19.30 í »Zions Kirkens Sognhus«, sum liggur á Nygårdsvej 103 í Esbjerg. Heri Eltør talar. Bønarmøti byrjar kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Jólahugni í Felagslonini**
í Fuglafirði verður fyri allar fólkapensjónistar við maka í Fuglafjarðar kommunu, týskvøldið 3. desember kl. 19.00.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Kongshavnar Kvinnufelag**
Hevur jólahugna fyri limir við gesti í húsum felagsins mikukvøldið 4. des. kl. 19.00.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319630/61655400.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Jólasøla verður alla vikuna frá kl. 14–17.00 í kjallaranum. Inngongd frá Grasagarði**
*Mánadagin 2. des.:*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 **Gera jólaprýði og dekoratiónir**
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobbspæl, dart og onnur spøl. Tilm. til jólaborðið miku- og fríggjadagin tlf. 316491
*Týsdagin 3. des.:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 **Hvat er eitt eldraráð?** Leivur Hansen
*Mikudagin 4. des.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 **Jólaborð og pakkaspæl.** Tilmelding mánadag. tlf. 316491
kl. 15 Túrur. (Sjá skránna í bløðunum)
*Hósdagin 5. des.:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 6. des.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 **Jólaborð og pakkaspæl**. Tilmelding mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 8. desember verður gingið undir Vestmannasund. Byrjað verður kl. 14.00 (saman við Bragdinum) úr Leynum. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 13.00. Tilmelding í seinasta lagi 2. desember.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20–21.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
Skrivstovan Listafólkasamband Føroya í Pætursarstovu, er opin allar gerandisdagar frá kl. 9-12. Limir eru vælkomnir inn á gólvið.
tlf: 320197
teldupostur:lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

# LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 30. nov.: Fuglafjørður tlf. 44 40 38
Sunnudagin 1. des.: Skála tlf. 44 14 90

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

# BRÚDLEYP

Í dag, 30. nov. giftast í Roskilde Domkirke, Johanna Mathilda Pedersen, dóttir Lydiu og Henning Pedersen, Ishøj og Morten Ove Nielsen, Vallensbæk. Brúdleypsadr.: Sonnerupgaard Gods, Tøllosevej 53, Hvalsø.
Heimaadr.: Murergården 8, 2635 Ishøj.

14. desember kl. 16.00 giftast í Gøtu kirkju Noomi Sigurðsdóttir Sørensen, Norðragøta og Petur Reinert, Leirvík. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið, kunnu tekna seg á tlf. 441363 ella 443215 í seinasta lagi 8. desember 2002.

# SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 3. desember kunnu hjúnini Ásbjørg og Heini Reinert, Leirvík, halda silvurbrúdleyp. Vælkomst verður heima 30. november frá kl. 19.00.

Týsdagin 3. desember hava Erla og Sofus Borðoy Tórshavn, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin við morgunmati **leygardagin 7. desember** frá kl. 11.00 heima í Brúnugøtu 3.

17. desember hava Tóra og Henge Isaksen, Kvívík verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin 21. desember kl. 19.00 á Hotel Føroyum. Tey, sum ynskja at hugna sær saman við silvurbrúðarparinum hetta kvøldið, verða biðin at siga frá á tlf. 421213 áðrenn 08. desember.

# KRÚNDIAMANTBRÚDLEYP

Týsdagin 3. des. kunnu hjúnini Kristina Sofía (Dinnafía) og Jógvan Sofus Ferjá við Gjógv hava krúndiamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Hotel Hafnia leygardagin 7. desember saman við familjuni.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Signaður veri Hann, sum kemur í navni Harrans«.*

Soleiðis bjóðaði mannamúgvan Jesusi vælkomnum tá ið hann reið inn í Jerusalem. Tá ið vit hoyra hesa søgu á kirkjuársins fyrsta degi, er hon bara ljós og festlig. Øðrvísi er pálmasunnudag. Tá hómast langa fríggjadagur aftanfyri. So kunnu vit ikki lata vera við eisini at hugsa um, hvat tey róptu skírshósdag, tá ið tey kravdu, at fáa hann krossfestan. Tey vóru tá vorðin vónsvikin, tá tað vísti seg, at hann var øðrvísi, enn tey hildu.

Men vit vita betri enn jødarnir. Vit vita væl, at Jesus ikki er ein jørðiskur kongur við ytri mátti og dýrd, men at hann kortini er kongur, ið hevur uppiborið allan heiður tá ið hann kemur. Hann vil ráða yvir okkum. Hvat skuldi hann annars verið kongur til? Men tað er til okkara gagn og gleði, hann vil tað. Hann veit, at vit duga als ikki at stýra okkum sjálv, at tað ikki førir til nakað gott, at vit taka ræði í egnar hendur. Tí bjóðar hann okkum, at hann vil stýra og ráða í øllum okkara lívsviðurskiftum, men harvið eisini taka alla ábyrgd á seg. Har hann fær loyvi at ráða, fylgir eisini signing við.

Tí eiga vit ikki at smekka hurðina aftur fyri honum, men bjóða honum vælkomnum og takka honum, tí hann ikki heldur seg ov góðan at koma á gátt hjá okkum við sínum friði, og við at geva okkara lívi meining. Hetta hava vit leingi havt tørv á, at ein, sum veruliga er sína uppgávu vaksin, skal hava harradømi yvir okkum. Vit hava óviað longu gjørt ta sannroynd, at vit sjálv eru ov smá til tað.

Amen!

**John S. Myllhamar**







## Stjóri á Teknisku deild

*"Forðingar er tað, vit síggja, tá ið vit taka eygini frá málinum"*
Henry Ford

Fyri tekniska stjóra okkara, sum søkir sær nýggjar avbjóðingar, verður søkt eftir nýggjum tekniskum stjóra. Umframt at vera stjóri á Teknisku deild myndar tekniskur stjórin leiðslubólkin á Føroya Tele saman við fíggjarstjóranum, marknaðarstjóranum og stjóranum fyri nýstovnaðu deildini Virkismenning.

**Tekniska deild er í dag skipað við hesum undirdeildum:**
· Radiodeild
· Støðardeild
· Transmissióndeild
· Kaðaldeild
· Byggideild
· Planlegging og samskipan (stápar)
· Installatión
· IP-Net
· tey 6 FT-økini uttanfyri Suðurstreym

Tilsamans telur deildin 130 fólk.

Uppgávan hjá teknisku deild fevnir um rakstur, nýgerð planlegging, dokumentatión og samskipan innan støðar-, fartelefon-, radio-, beinara-, kaðal-, og transmissiónskipanum, herundir eisini uttanlandasambandið við Cantat 3, Farice, og fylgisveinasamskiftið.
Umframt hetta hoyrir rakstur og nýgerð av bygningum eisini til deildina.

**Ábyrgdin hjá tekniska stjóranum verður, umframt omanfyri standandi:**
· at luttaka í altjóða samstarvi við aðrar veitarar
· at síggja til at nýggj tøkni og nýggjar tænastur verða skipaðar á skynsamiligan hátt
· at samskipa deildirnar til at virka operativt sum ein eind
· at síggja til, at starvsfólkið hevur neyðugu førleikarnar at røkja uppgávurnar
· saman við leiðslubólkinum og starvsfólki annars, at leggja tøkniligu strategiina fyri Føroya Tele
· at rakstar-, íløgu- og tíðarætlanir halda.

Umráðandi er, at tann, ið sett/-ur verður, hevur hollan kunnleika til fjarskiftistøkni.

Útbúgving: Ástøðilig útbúgving frá hægri lærustovni sum t.d. verkfrøðingur ella líknandi.

Løn sambært avtalu.

## Stjóri á Virkismenning

*"Um framtíðina er at siga, at tú skalt ikki síggja hana, men gera hana møguliga"*
Antoine de Saint-Exupéry

Føroya Tele hevur í skjótt 100 ár verið einasti útbjóðarin av fjarskifti í Føroyum. Í einum nútímans samfelag er ikki ynskiligt við monopolstøðu, líkari tí, sum Føroya Tele (áður TFL) hevur havt, og vit bjóða tí eisini okkara kappingarneytum vælkomnir á marknaðin.
Hinvegin merkir henda gongdin, at Føroya Tele ynskir at taka upp nýggj virkisøki fyri teir marknaðarpartar, sum náturliga verða minni. Vit mugu tí venda okkum til aðrar marknaðir og í flestu førum vil tað siga, at velta upp úr nýggjum. Sum dømi kann nevnast Televarpið.
Virkismenning hevur í skjótt tvey ár verið stápsfunktión undir stjórnaum, men tørvur er nú á, at deildin verður sjálvstøðug linja.
Á deildini arbeiða í løtuni 4 fólk.

Týdningurin av nýggju linjuni verður undirstrikaður av, at upprættað verður nýtt deildarstjórastarv í virkismenning. Nýggi deildarstjórin verður partur av dagligu leiðsluni í Føroya Tele saman við forstjóranum, fíggjarstjóranum, marknaðarstjóranum og tekniska stjóranum.

**Ábyrgdin hjá nýggja stjóranum verður**
· at menna deildina í mun til tey rák og ábendingar um nýggjar virkismøguleikar, sum kunnu vera áhugaverdir fyri Føroya Tele
· at velja røttu starvsfólkini og síggja til, at tey hava neyðugu førleikarnar at røkja teirra uppgávur
· saman við leiðslubólkinum og starvsfólki, at leggja strategiir fyri framtíðar virkisøki hjá Føroya Tele
· at rakstar-, íløgu- og tíðarætanir halda.

Umráðandi er, at tann, ið sett/-ur verður, hevur hollar royndir umframt viðkomandi útbúgving.

Løn sambært avtalu.

## Umráðandi fyri Føroya Tele er, at tey, ið sett verða:

· hava góð samstarvsevni og áhuga fyri trivnaði starvsfólksins
· hava leiðsluroyndir frá líknandi størvum innan tað almenna ella innan privata vinnulívið
· vilja taka stundum stórar avbjóðingar til sín
· duga at geva frá sær uppgávur og eggja øðrum til at taka við avbjóðingum
· hava hollan kunnleika til KT
· hava royndir í at arbeiða í altjóða umhvørvi
· duga enskt og skandinaviskt á samráðingarstigi
· trívast í einum umhvørvi, sum broytist frá degi til dags
· hava áræði og eru ágrýtin

Meira fæst at vita um størvini frá Andrasi Róin, stjóra, á tlf. 303030

Umsøknir við avritum av viðmælum og prógvum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. desember 2002 kl. 12.00.

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Box 27
110 Tórshavn

Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýri eigur 100%. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ymiskum støðum kringa alt landið. Fjarskiftisøkið er í stórari menning og tí er neyðugt at starvsfólk á Føroya Tele tola broytingar í starvsviðurskiftunum.

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*